# Ellindur bóndi á Jaðri

**Týr**

Ellindur Bóndi á Jaðri
Flestøll munnu hann muna
Hann var so væl til barna komin
Tríati átti hann synir

Her er gott at dansa

Ellindur stendur á hallargólvi
Eingin talar orð
Hann skeyt fyri sín riddaraskjøldur
Niðast viddð kongsinns borddð

Her er gott at dansa
Stovan hon er nýggj
Stokkar eru av stáli gjørdir
Og tekjan er av blýggj
Her er gott at dansa

Eg havi upp við skatti alið
Tríati synir baldar,
Lívið mítt og góðsið alt
Tað er í tygara valdi

Her er gott at dansa

Fimtan skulu eftir vera
Bóndi, av synum tínum
Annaðslíkt skal aftur fara
Og gleða móður sína

Her er gott at dansa
Stovan hon er nýggj
Stokkar eru av stáli gjørdir
Og tekjan er av blýggj
Her er gott at dansa

Tištěno z www.txp.cz Sponzor: www.srovnavac.cz - šetříme na pojištění!